## DAGSINS MEINING

# Gott áralag skal til

Í skrivandi stund er ikki komið heilt undir land við breiðu samgonguni, men tað tykist ganga tann vegin. Tosað hevur verið um eina breiða samgongu nú í seks ár, men nústaðni tykist hon gerast veruleiki. Tað er gott fyri Føroya land, at vit fáa eina breiða handlikraftiga samgongu, ið kann taka tær avgerðir, ið eru neyðugar í hesum búskaparligt hættisligu tíðum.

Tað er av alstórum týdningi, at áralagið í einari slíkari samgongu er gott, og at Løgmaður hevur landstýrisfólk, ið tosa við hvørt annað og kunna hvørt annað um politisk tiltøk, so samgongan kann standa sum ein, tá mál fara niðan í Løgtingið. Undanfarna samgongan tyktist viðhvørt verða eins og tvær samgongur, har Fólkaflokkurin segði eitt og Tjóðveldisflokkurin segði eitt annað. Nú skal so sigast, at Tjóðveldisflokkurin ikki bara var framúr heppin við sínum vali av landsstýrisfólkum. Her hugsa vit serliga um tveir mentamálaráðharrar, ið ikki sótu leingi í sessinum, áðrenn rok varð. Vónandi sleppa vit undan slíkum framyvir.

Eisini er at vóna , at proklamatiónspolitikkur, har politikarar ikki kunnu ganga framvið einum trappusteini, uttan at fara uppá hann at proklamera okkurt, verður søga nú, tá proklamatiónsflokkur nummar eitt eftir øllum at døma fer í andstøðu.

Tað verður eitt frískt lot fyri Føroya fólk, um vit kunnu fáa eitt stabilt landsstýri, uttan at stríð skal vera gerandiskostur. Ein komandi løgmaður eigur at gera sítt ítarsta fyri at tryggja stabilitet og semju og ikki minst gott áralag. Tað at vit hava fingið eina stýrisskipanarlóg, har einstøk landstýrisfólk hava fulla ábyrgd av sínum øki, nýtist ikki at merkja, at landstýrisfólk ikki kunna hvønn annan og semjast, áðrenn tey fara í Tingið við einum uppskoti.

Ein breið samgonga við góðum áralagi er einki minni enn ein neyðugheit, nú sannleikin um tann sterka búskapin kemur fram. Samgongan, ið liggur í kortunum, men sum ikki so mikið sum er skipað, er longu vorðin ákærd av Tjóðveldisflokkinum fyri at vilja knúsa búskapin. Hetta er ivaleyst bara ein forsmakkur uppá, hvat ein komandi samgonga má standa modell til av hondvaski. Vónandi megnar ein komandi samgonga at skapa ein góðan dialog við andstøðuna, men hvussu skal tað verða, tá formaður Tjóðveldisfloksins ikki vil viðganga, at fíggjarlógaruppskotið hjá Karsten Hansen vísir hall í 2004, og hevði gjørt tað, hóast keksavgjald o.s.fr. varð samtykt, tí inntøkumetingarnar eru lækkaðar somikið nógv? Hetta er ein óreingiligur veruleiki, ið sjálvt Karsten Hansen viðgongur. Mytan um tann sterka búskapin má eftir øllum at døma ikki punkterast, hóast prógvini móti hesum liggja á borðinum. Eingin ynskir hall á einari fíggjarlóg, men um Karsten Hansen hevði latið eitt betri uppskot frá sær, enn hann gjørdi, so nýttust vit ikki at diskutera tað. Tað gjørdi hann ikki, og tí verður tað einki stuttligt hjá komandi samgongu at rudda upp, og fáa skil á eina fíggjarlóg fyri 2004. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ráðgeving og vegleiðing til sjúklingar í Danmark

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
*Tormóður Stórá, formaður*



Seinastu dagarnar hevur verið nakað av skriving í bløðunum um skipanina við sjúklingavegleiðara á Ríkissjúkrahúsinum og Hotel Tórshavn, sum verður niðurlagt sum sjálvstøðugt starv. Okkurt av tí, sum hevur verið ført fram, kundi givið fólki fatan av, at tað er tænastan, sum Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark hevur til sjúklingar, sum talan er um. Tað er tí umráðandi hjá okkum at gera vart við, at tað ikki er talan um hesa ráðgevingina. Vit hava síðani 1. apríl 1995 arbeitt ein dag um vikuna á Hotel Tórshavn, har sjúklingar og teirra avvarðandi hava fingið ráð og vegleiðing í sosialum, fíggjarligum og persónligum viðurskiftum. Hetta er partur av virkseminum hjá sjálvognarstovninum Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark.

Ráðgevingin hevur drúgvar royndir síðandi 1984 við ráðgeving av føroyskum sjúklingum og teirra avvarðandi. Okkara meting er, at tørvur er á einum føroyskum sjúkrarøktarfrøðingi, sum arbeiðir burturav sum sjúklingavegleiðari. Tað hevur stóran týdning fyri sjúklingarnir og tey avvarðandi, at tey hava ein persón at venda sær til, ein at tosa við um trupulleikarnir, ein sum kann fara við til læknasamrøður, ein sum kann tosa við deildina um trupulleikar stinga seg upp, ein sum regluliga vitjar innlagdar sjúklingar og ein sum tryggjar kontinuitetin í samstarvinum millum tann einstaka og sjúkrahúsverkið í Føroyum og Danmark.

Arbeiðuppgávurnar hjá sjúklingavegleiðaranum liggja ofta nær ella í samband við okkara virksemi og sjúklingavegleiðarin er tí ein týðandi samstarvsfelagi hjá Ráðgevingini. Arbeitt varð í fleiri ár fyri at fáa sett ein sjúklingavegleiðara og tað er okkara sannføring at tørvurin er stórur og undrar tað, tá tað nú uttanumvegis fréttist, at hendan tænastan skal avtakast sum sjálvstøðugt starv, tí tørvurin ikki er har.

Um játtanin til sjúklingavegleiðaran skal nýtast til avloysarar og vegleiðararbeiðið skal leggjast út til 8 ymiskar sjúkrarøktarfrøðingar við skiftandi vaktum, er ongin ivi um, at tænastustøðið lækkar. Hetta er sera harmiligt, tá hugsað verður um, at enn fleiri sjúklingar fáa brúk fyri einum sjúklingavegleiðara í framtíðini, tí færri sjúklingar fáa játtað fylgjara við sambært nýggju kunngerðini.

# Jústinus og fólkaræði

**Abraham Mikladal**



Nú ætlaði eg ikki at læra teg meir um fólkaræði í Føroyum, men tá tú bendir "støðuna hjá Kallsberg" til at vera ein trupulleika í stýrisskipanarlógini, so havi eg hug at royna einaferð enn.

Óivað skulu stýrisskipanarlógin og vallógin broytast. Sjálvur eri eg t.d. fyri einum valdømi í Føroyum. Men lat okkum í fyrstu atløgu halda okkum til fakta.

Vit hava eitt fólkaræði, ið byggir á tað tríbýtta valdið (lóggevandi, útinnandi og dømandi).

Tað lóggevandi valdið kann bert samtykkja lógir, og bert við einum meiriluta. So um nøkur av tingmanningini eru kriminell, so koma tey ikki einsamøll at samtykkja nakra lóg, tíanbetur. Somuleiðis kann ein løgtingslimur einki seta í verk ella útinna!

Hinvegin er tað óivað rímuligt, at slík fólk finnast á tingi, tí á tann hátt umboðar tingið fólkasamansetingina betur.

Tá tað kemur til tað úinnandi og dømandi valdið, er støðan ein heilt onnur. Har kann ein persónur útinna gerðir, ið kunnu koma einstaklingum, bólkum ja, øllum samfelagnum í óføri. T.d. hevur løgmaður heimild til at skriva út val, senda landsstýrisfólk til hús o.s.fr. Tí mugu vit ikki góðtaka, at embætini verða misnýtt, og at fólk, sum røkja embætini, siga ósatt.

Og tað hevur onki við persónin Anfinn Kallsberg at gera. Somu treytir galda sjálvandi fyri ein og hvønn, ið fær litið eitt embæti í útinnandi ella dømandi valdinum upp í hendur.

Tað finnast nógvir rættvorðnir borgarar, so tað er púra óneyðugt at seta kriminell og óálítandi fólk í fremstu røð. Verður tað gjørt, hóast alt, so er okkurt spinnandi galið við teimum, sum gera tað.

Jústinus, eg vóni at tú skilur munin.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Byrjið ikki at roykja

**Boðskapurin til næmingarnar í fólkaskúlunum var týðuligur á roykiátakinum, sum Klaksvíkar kommuna og skúlarnir skipaðu fyri fríggjamorgunin. Tit, ið ikki roykja, byrjið ongantíð, og tit ið roykja, leggið av sum skjótast**

ROYKING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Salurin í KFUM og K var stúgvandi fullur av næmingum úr 6. til og 10. flokk til roykiátakið hjá Klaksvíkar kommunu: Royking stinkar*

**Klaksvík:**
Salurin í KFUM og K var karmur um royki átakið, sum kallast Royking stinkar. Salurin var stúgvandi fullur av skúlanæmingum úr 6. til og við 10. flokki.

Ragnhild Ellingsgaard var frásøgufólk, og nógv spennandi var á skránni. Fyrst kom Tina Purkhús, sum er limur í roykibólkinum í fólkaskúlunum. Síðani skúlastjórin í skúlanum við Ósánna, Símun Petur Hjelm. Hann helt, at hetta tiltakið var sera gott og heitti á roykibólkin um at halda fram við teirra arbeiði framyvir.

– Stuðul fáa tit frá leiðslunum á báðum skúlunum, segði skúlastjórin millum annað.

Síðani kom formaðurin í heilsunevnini hjá Klaksvíkar býráð, Rani Nolsøe. Hann heitti á næmingarnar at lurta væl eftir, njóta undirhaldið, men ikki gloyma álvarin í tiltakinum.

Somuleiðis fegnaðist hann um, alt arbeiðið, sum roykibólkurin hevur gjørt, og at skúlaleiðslurnar ynskja, at arbeiðið heldur fram.

### Undirhald

Tá røðurnar vóru lidnar, kom tann meiri undirhaldandi parturin av átakinum. Fyrst komu tveir heldur skemtiligir persónar at leggja nøkur fakta fram um royking. Síðani sang Brandur Enni lagið Heimið saman við Rana Nolsøe, sum spældi undir.

Tá Brandur var liðugur at syngja, komu fimm fyrimyndir upp á pallin, sum hvør høvdu ein boðskap um allar vansarnar við at roykja. Una Olsen, hondbóltsleikari, Rani Tómasson, telvari, Jákup Mikkelsen, landsliðsmálverji, Marjun Kalsø, flogbóltsleikari og Brandur Enni, tónleikari.

Síðani varð ein nýggjur filmur frá Kræftens Bekæmpelse vístur. Og aftaná hevði danski sjónvarpslæknin, Peter Qvortrup Geisling eitt innlegg. Hann vildi ikki koma við nøkrum hóttanum um, hvussu vandamikið tað er at roykja. Tað helt hann, at øll mundu vita í dag. Hinvegin heitti hann á ikkiroykjarar um at standa saman og royna at gera teirra ávirkan til, at fólk ikki byrja.

– Trupulleikin við roykingini er, at tað er so langt frá sjálvari njótingini til rokningin fyri hana kemur, segði sjónvarpslæknin millum annað.

### Royfríir flokkar

Ein kanning varð gjørd fyri tveimum árum síðani av roykimynstrinum í fólkaskúlunum í Klaksvík. Og til hetta átakið var so aftur ein kanning gjørd. Úrsltitið varð kunngjørt undir tiltakinum.

Tað vísti seg, at munandi færri næmingar roykja dagliga í dag í mun til fyri tveimum árum síðani í báðum skúlunum. Yvir 50 % av teimum spurdu, hava ongantíð roykt, og kynsbýtið millum roykjararnar vísti, at tað var javnt inntil níggjuna flokk. Tá byrja genturnar at fara fram um dreingirnar, og í tíggjunda flokki er tað nógv fleiri gentur, ið roykja enn dreingir.

Kanningin vísti somuleiðis týðuliga, at flestu næmingarnir byrja at roykja í sætta flokki. Ongin byrjar í tíggjunda. So Olga Biskopstø, sum legði kanningina fram, segði, at har má arbeiðast miðvíst við at forða næmingunum í yvirhøvur at byrja at roykja.

Eitt annað, sum kanningin vísti var, at tað í dag eru seks roykfríir flokkar frá 6. til 10. flokk í fólkaskúlunum í Klaksvík. Hesir flokkar fingu allir hvør sítt skreytblað frá Klaksvíkar kommunu, sum tey kunnu heingja upp í flokshølinum. Flokkarnir vóru: 6. a, 6. b, 7. a, 8 b og 8. c í skúlanum á Ziskatrøð. Og 6. b í skúlanum við Ósánna.

Alt bendir á, at eitt líknandi tiltak verður skjótt fyriskipað aftur í Klaksvík. Ynski vóru í øllum førum frammi um, at tað longu verður aftur komandi ár.

Fyribyrgingarráðið:

# Fullkomið bann er loysnin

**Formaðurin í Fyribyrgingarráð Føroyar, Heðin Thomsen heldur ikki, at upplýsingararbeiðið munar nóg væl, tá tað kemur til royking. Hann er ikki í iva um, at tað einasta, sum veruliga hevði munað, er eitt fullkomið bann á allari tubbaksframleiðslu og sølu**

ROYKING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum heldur fullkomið bann av allari tubbaksframleiðslu og sølu vera tað bestu loysnina fyri at fáa talið á roykjarum í Føroyum niður*

*Savnsmynd*

Heðin Thomsen er ikki í iva um, at tað einasta rætta hevði verið at sett fullkomið bann á alla framleiðslu og sølu av tubbaki. Tað er tað,sum hann heldur, hevði gjørt munin í Føroyum.

– Sjálvandi hevði tað óivað havt nakað av svørtum marknaði við sær í byrjanini, men tað ber ikki til at halda slíkt loyniligt í langa tíð í einum so lítlum landi sum Føroyar, so tað er avgjørt tað, sum hevði gjørt munin herheima hjá okkum, staðfestir Heðin.

Hann ivast somuleiðis í, um tann vanligi borgarin í Føroyum, sum kanska roykir einar 20 sigarettir um dagin, hevði farið í holt við at smugla sigarettir, um tær vóru bannaðar.

Hann vísir á, at gongdin í útlondunum er hendan at seta fullkomið bann á sølu og framleiðslu av tubbaki.

### Samfelagið ábyrgdina

Heimskenda læknatíðarritið the Lancet hevur greitt sagt seg ganga inn fyri fullkomnum banni av allari tubbaksframleiðslu og sølu, og formaðurin í Fyribyrgingarráðnum heldur tað bert vera ein spurning um tíð, inntil tað verður gjørt nakað við tað.

– Upplýsing er uppgivin. Roykjarar eru so bundnir av sigarettunum, at tað nyttar onki at upplýsa meira um vandan, nú mugu og skulu tiltøk til, sigur Heðin Thomsen. Hann greiðir frá, at í the Lancet verða politikarar drignir til svars fyri støðuni. Yvirskriftin í einari grein ljóðar: Do you sleep at night, mr Blair? Her verður hugsað um, at politikarar, sum sita við valdinum, høvuðsábyrgdini, vitanini og møguleikanum til at gera okkurt við støðuna, ikki gera nakað, vísir Heðin á.

– Størsti trupulleikin er, at samfelagið gevur fría atgongd til eina vøru, sum drepur helvtina av teimum, sum njóta hana, sigur formaðurin í Fyribyrgingarráðnum.

Hann er ikki í iva um, at fullkomið bann er tann bíligasta loysnin og tann mest effektiva.

### Upplýsing munar ikki

– Átakið ímóti royking, sum Klaksvíkar kommuna skipaði fyri, er eitt gott tiltak, og vit luttóku í tí, men eg haldi, at tað er væl og virðiliga staðfest, at upplýsingartiltak ikki muna nóg væl, tá tað kemur til royking, sigur Heðin Thomsen.

Hann sigur, at sjálvandi skal upplýsing til, og hann leggur dent á, at tað eru nógvir ymiskir hættir at upplýsa uppá, men samstundis vísir hann á, at gongdin aðrastaðni í heiminum er, at tiltøk heldur verða sett í verk til tess at minka um talið á roykjarum.

– Tað er ongin í dag, sum ikki veit av, hvussu hættisligt tað er at roykja, men tað ger ikki tann stóra munin – sjálvt við ræðukampanjum, heldur formaðurin í Fyribyrgingarráðnum. Hann hevur eisini onnur hugskot, um við hvørjum tiltøkum talið á roykjarum kann minkast.

– Við at hækka prísin á sigarettum og aldursmarkið fyri at keypa. Og so forboð fyri at roykja á almennum støðum. Tað ger eisini sín mun, sigur Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum, sum tó sær eitt fullkomið bann, sum ta bestu loysnina.

Ein kanning, sum Gallup gjørdi fyri Fyribyrgingarráðið í fjør vísir, at 36 % av føroyingum roykja. Yvir 70 % av teimum spurdu, vilja hava roykibann á almennum støðum.